

*Jens í Kálgarðinum, abbi Gerdu*

men alt forgjeves. Derimod fandtes alle de Langliner, som Baadens Mandskab havde haft med, lige for Frodebø Nypen, tæt ved Land og samlede. Da Baaden sandsynligvis kun kunde drive indad fra Nypen til Osdal med det første af Ostfaldet, antoges Baaden at være forlist Kl omtrent 4 i Nat.

Tann 12. desember verða tveir aðrir avhoyrdir. Teir høvdu eisini verið á veg til útróðrar hendan dagin. Men tá veðrið var heldur vánaligt, og ein av manningini var fullur, avgjørdu teir at venda aftur.

Tískil var abbi bert fýra ára gamal, tá ið hann misti pápan.

## Tippisakin

Ein sak, sum er knýtt at okkara ættarsøgu, er tann sokallaða Tippisakin. Tað hava ikki búð nógv fólk á Tvøroyri tá, so at missa fimm mans í besta aldri í bygdini hevur verið ein rættiligur smeitur. Í 1860 búðu bert 338 fólk í allari sóknini. Tá hava tey verið nakað fleiri.

Sosiala trygdin var lítil og eingin, so tað hevur ikki verið lætt hjá eini einkju at lívbjarga sær. Handil var í bygdini við fríari rúsdrekkasølu. Hetta var ein stór freisting. Áttu fólk jørð, var ikki so neyðugt við reiðum peningi at gjalda við. Tað kundi "skrivast," og tá skuldin var nóg stór, kundi handilsmaðurin fara við jørðini. Soleiðis var tað alla staðni í Føroyum, og var hetta orsøk til nógvar sorgarleikir. Hetta broyttist sum kunnugt við fólkaatkvøðuni í 1908, sum steðgaði fríu søluni.

Eitt dømi um hesa støðu er Tippisakin. Hetta var eitt sakarmál, sum gekk í rættarskipanini í fleiri ár. Sakin endaði við landsrættardómi í 1911.

Spurningurin í sakini var, hvør ið átti hesa jørðina í Tippinum. Sakarpartarnir vóru Mortensen keypmenn øðrumegin og langomma Cathrine Malene saman við systir hennara Appolonia Jespersen hinumegin.

Sakin liggur á landskjalasavninum og fyllir sera nógv. Tað kundi uttan iva verið skrivað ein longri søga bert um hetta mál.

Í rættinum í Føroyum vunnu tær báðar, men tapararnir skutu sakina inn fyri landsrættin, og har fingu teir viðhald. Mortensenmenninir hava eisini verið betri fyri at verja sína søk enn tvær einsamallar kvinnur, sum neyvan hava megnað tað stóra, hóast tær høvdu verja fyri seg.

Um Appoloniu sigst, at hon var sera illa sint. Tá ið hon sat eftir við ongum lovaði hon eisini ilt.

## Mortensenmaðurin, sum gjørdist sosialist

Pápi mín æt Edvard Mortensen, sonur Jens Mortensen í Kálgarðinum í Øravík.

Jens var føddur í Øravík 13. februar 1851. Pàll Nolsøe greiðir frá í Føroya Siglingarsøgu, at pápi hansara, langabbi mín, var Petur Mohr Mortensen, smiður, og mamman var Julia Matilda Sørensen, ættað úr Keypmannahavn. Petur Mohr var komin at kenna hana, táið hann lærdi jarnsmíð hjá pápa hennara. Langabbi var beiggi "gamla" Johan Mortensen, sum byrjaði Mortensenfyritøkuna á Tvøroyri.

Abbi sigldi eina tíð við skipum hjá pápabeiggjanum Gamla Mortensen. Hann var síðan við donskum skipum og tók stýrimansprógv á Bogø í 1878. Hetta gjørdu nógvir føroyingar tá í tíðini. Ein teirra var Jens Mohr í Havn.

Fyrsta skip, hann førdi, var sluppin Peder ella Fransurin í 1882. Hann førdi síðan ymisk skip, og hann førdi Plover í 1887 til hon í 1888 fórst í august mánaða av ísi á Lamboyri uttan fyri Skála, har teir royndu við bátum. Hetta er sunnanfyri Langanes í Íslandi. Tað varð sagt frá, at skipið lá fyri akker, og at bátarnir vóru á útróðri. Abbi var staddur í landi og bræddi livur, tá ið knappliga drift kom á ísin, sum setti skipið á land, har tað kroystist og gjørdist vrak. Mannskaði var tó eingin. Nakað varð bjargað av vrakinum, millum annað skipsklokkan, ið hekk leingi eftir tað í einum handli í Thórshøfn nærindis.

Tá ið Mortensens handil í februar 1892 keypti sluppina Alfred Trower úr Onglandi, fekk abbi hana at føra. Henda slupp varð bygd úr stáli og kom at eita Suðringur. Hann førdi hana til 1904. Frá 1904 til 1906 førdi abbi sluppina Don í farmasigling. Don hevði verið eitt gott skip, men var nú gomul og útslitin. Hon var farin at leka illa, og tá ið teir í 1905 vóru á veg úr Íslandi til Føroya, mundi hon sokkið millum londini.

Abbi legðist nú uppi og fekst við at seyma segl hjá Mortensen og inni á Hvítanesi. Men hann førdi onkuntíð skip niður við fiski. Abbi doyði 83 ára gamal 13. apríl 1934. Hann minnist eg væl.

## Pápi fekk tuberklar

Pápi mín Edvard Mortensen fór á bedingina at arbeiða, tá ið hann var 18 ár. Her fekk hann arbeiðsskaða eina ferð, hann lyfti ein av hesum stóru eikiplankunum. Hann fekk slysni, og hetta setti seg til tubeklar í rygginum. Hann bleiv sera sjúkur, og hann kundi aftaná tað einki gera uttan okkurt lættligt arbeiði.

Pápi plagdi at gera slíkt sum at ramma inn myndir fyri fólk. Ikki gav hetta tó tað stóra. Pápi førdi kassabók, og her sæst, at ein stór mynd kostaði kr. 1,33 at ramma inn.

Pápi var á ymiskum sanatorium niðri, fyrstu ferð í 1924. Hann mann kortini hava verið fyrst á bróstsjúkrahúsinum í Hoydølum.

Vit frættu frá honum gjøgnum postkort, og tað hevur verið ringt fyri hann at vera so langt burtur. Hann var heima ímillum, og fór so niður aftur. Pápi var so heima, tá ið mamma doyði í 1926. Eg minnist, at hann tók meg i fangið og segði, at mamma var deyð.

Tey vórðu gift í 1919. Brúðmenn vóru Jaspur, pápi Hans Holm, og rithøvundurin Hans Andreas Djurhuus, sum eitt skifti var lærari á Tvøroyri.

Pápi hevur vist eisini verið vikarur sum lærari, tí Arnold Jespersen, sum doyði fyri kortum, segði, at besti lærarin í skúlanum var pápi. Víst var hann ikki lærdur, men hann dugdi væl at læra frá sær.

Pápi lá á Finsens Lysinstitut, sum tað kallaðist, í gott trý ár. Tá hann var so frægur, at hann kundi ganga við tveimum høkjum, slapp hann heim aftur. Hetta hevur verið í 1932. Eg mátti fáa eina mynd av pápa, so eg kundi kenna hann, tá ið hann kom. Pápi kláraði so at trena seg upp, so hann kundi ganga við einum stavi.

Hann gekk við eini tjúkkari leðurbandagu, sum skuldi skiftast út í 1937. Tá var meiningin, at vit skuldu fara niður við, men hann doyði áðrenn.



*Margreta og Petur Lars Petersen, foreldrini hjá mammu Gerdu. Tey gjørdust sum foreldur hennara*



*Fyrstu húsini í Puntabyrgi*



*Edvard, pápi Gerdu, doyðu ungur*

Pápi skrivaði nokk so nógv niður, og millum tað, hann skrivaði var, at hann hevði fingið at vita, at sjúkan var ólekilig, men við bandagu kundi hann liva nøkur ár.

## Pápi og Fylking

Arbeiðsmannafelagið Fylking, ella Enigheden sum navnið upprunaliga var, var fyrsta arbeiðarafelag í landinum. Her var pápi eisini virkin. Hann er eisini umrøddur fleiri staðir í bókini hjá Jóannes Dalsgaard um hetta felag, og her skal takast tað fram, sum hann skrivar um pápa.

Her kann verða nevnt, at tá vóru tveir Edvard Mortensen á Tvøroyri. Ein trupulleiki við, at tað vóru tveir við sama navni, var, at posturin av og á fór til skeivan móttakara, og harvið fekk pápi upplýsingar um